Copydan/
AVU-medier

NÁM

# Livandi myndir í undirvísingini

Fá íblástur frá ítøkiligum dømum um, hvussu tú kanst undirvísa bæði í grunddeild, miðdeild og hádeild við at nýta sjónvarpssendingar og filmar sum tilfar. Námsfrøðiligar vegleiðingar, sum lærugreinaráðgevar hava gjørt, eru við í flestu dømunum.

Til fólkaskúlan





Margrete den første



Tigermælk



Ternet Ninja 2

Sjónvarpssendingar og filmar eru týðandi og dygdargóð námsfrøðilig amboð. Søgulig tíðarskeið gerast livandi á skíggjanum; fremmandamál fara spælandi inn í hoyrnina og tilvitskuna – og úrtøkilig temu verða flutt í eygnahædd soleiðis, at næmingurin fatar tey og kennir tey á sær. Tað er livandi læring!



Myndatakari | Ditte Valente

# Undirvís við sjónvarps-sendingum og spælifilmum gjøgnum mitCFU

Á stroymingartænastuni hjá CFU, mitCFU, er ein øgrynna av filmum og sjónvarpssendingum. Námsfrøðiligar vegleiðingar eru til fleiri hundrað av hesum, eins og tær hava ávísingar til brot, sum lærugreinaráðgevar hava gjørt.

Vegleiðingarnar geva ítøkilig hugskot til, hvussu tú undirvísir í sendingini ella filminum, eins og hvussu næmingarnir kunnu arbeiða við tilfarinum uttan mun til, um teir eru inni í flokshølinum ella on-line.

Við TVIS avtaluni frá AVU-medier og einum haldi hjá CFU Film og TV, fært tú millum annað atgongd til fleiri enn 50.000 sjónvarpssendingar frá donskum og útlendskum sjónvarpi til allar lærugreinar og floksstig, tú kanst stroyma frá Filmcentralen eins og tú kanst geva næmingum talgild skúlating fyri við at stroyma frá mitCFU. Gjøgnum avtaluna, sum verður kallað Spillefilmsaftalen frá AVU-medier, fær skúlin harumframt atgongd til fleiri enn 500 spælifilmar til at nýta í undirvísingini.

Á komandi síðunum er eitt yvirlit yvir dømi um tilfar frá mitCFU, sum er viðkomandi fyri ymiskar lærugreinar til grunddeildina, til miðdeild og til hádeild.

## Stroym filmar

Í mitCFU kanst tú sum lærari stroyma filmar og sjónvarpssendingar lætt og lógliga. Í mitCFU eru filmar og sendirøðir í hundraðtali, bæði nýtt og eldri tilfar, og javnan verða nýggir filmar og sendingar løgd inn. Sí niðanfyri, hvussu tú stroymir beinleiðis á mitCFU.

rise.articulate.com

# / Føroyskt

Hádeild

**”Bye Bye Blue Bird”**
/ 1999
”Roadmovie”, ið fylgir teimum báðum Rannvá og Barbu, tá tær venda aftur til Føroya eftir at hava búð uttanlands í fleiri ár.
→ mitcfu.dk/CFUFILM1076367

**”Nina”**
/ 2018
Nina er ungur rithøvundur, sum flytir saman við sjeiki sínum, Williami, úr Danmark til Føroya út á eina lítla oyggj. Í byrjanini tykist alt so hugfarsligt í friðarliga umhvørvinum, har hon hevur ætlað at hjúkla um seg sjálva og barnið, hon ber undir brósti, og skriva fyrstu skaldsøgu sína, meðan William arbeiðir sum lækni í Klaksvík. Tó gerst hennara uppliving av friðinum, hon leitaði eftir, skjótt til eina uppliving av at vera fangað.
→ mitcfu.dk/TV0000127122

**”Dreymar við havið”**
/ 2017
Almenniskjalig menningarsøga um at gerast vaksin, at blíva forelskað/-ur, at hava dreymar um eitt heilt øðrvísi lív og at finna seg sjálva/-n.
→ mitcfu.dk/TV0000127135


Dreymar við havið


Nina


Heartstone


Spískamarið

# / Føroyskt

**”Heartstone”**
/ 2016

Íslendskur spælifilmur frá 2016. Tannáringarnir Thor og Kristján eru vinmenn og búgva í eini lítlari bygd í Íslandi. Tað er summar, og teir eru á veg í vaksnamannaheimin og hava stóran áhuga fyri kynslívi og kynsbúning. Thor dámar væl Beth, og Kristján finnur útav, at hann er samkyndur.

→ mitcfu.dk/CFUFILM1076465

**”Skál”**
/ Føroyskur heimildarfilmur, 2021

Er tað synd at drekka, tá mann er kristin? Er tað synd at hava sjeik, sum ikki er kristin? Dania O. Tausen er 21 ára gomul og er uppald í einari kristnari samkomu í Føroyum, men er júst flutt til Havnar.

→ mitcfu.dk/TV0000127098

**”Spískamarið”**
/ Føroyskur heimildarfilmur, 2021

Føroysk matsending í seks pørtum. Saman við Gutta uppliva vit umhvørvið og fólkini kring hesar ómetaligu góðu rávørður, samstundis sum Gutti gevur hyggjaranum nýggjan íblástur til, hvussu tað á ein einfaldan hátt kann fáast nakað øðrvísi burtur úr føroyskum mati. Í teimum seks pørtunum er Gutti á vitjan í ávikavist Saksun, Borðoy, Sandoy, Nólsoy, Elduvík og í Koltri.

→ mitcfu.dk/TV0000101119

**”Trom”**
/ 2022

Føroysk krimirøð í seks pørtum. Røðin byggir á krimiskaldsøgurnar eftir Jógvan Isaksen um blaðmannin Hannis Martinsson.

→ mitcfu.dk/TV0000128102

**“Barbara”**
/ 1997

Tá sorinskrivarin sigur nýggja danska prestinum, at ein einkja er á kallinum, er prestur ikki hugaður at gifta seg við henni, sum vanligt var tá í tíðini. Men tá hevur hann enn ikki sæð Barbaru.

→ mitcfu.dk/CFUFILM1071278

/ Síggj dømi um sjónvarpssendingar og spælifilmar, sum eru viðkomandi fyri undirvísing og sum hava námsfrøðiliga vegleiðing til lærugreinina danskt á mitCFU.fo



Vi är Europa

# / Danskt

**Miðdeild**

**”Danmarks yngste dragqueen”**
/ DR1 2021

Donsk heimildarsending í tveimum pørtum. Í fyrra partinum fylgja vit broytingini hjá Jeppe frá at vera ein 12 ára gamal skúladrongur til at gerast yngsta dragqueen í Danmark. Jeppe kennir seg mest sum Jeppe, men samstundis hevur hann eina aðra síðu – eina meiri opna og fría, sum er Roberta, og sum hann ikki megnar at fjala. Umhvørvið hevur sera nógv at siga, tá Jeppe skal gerast til dragqueen. Námsfrøðilig vegleiðing og næmingauppgávur til brot.

→ mitcfu.dk/TV0000126417

**”Vi är Europa”**
/ SVT Barnkanalen 2022

Svensk sjónvarpsrøð við stuttum pørtum, sum snúgva seg um lívið hjá børnum í fleiri ymiskum evropeiskum londum. Næmingarnir kunnu ímynda sær, at teir skulu gera eina líknandi sending til danska Ramasjang ella til barnasendingina í sjónvarpinum hjá Kringvarpinum. Tú arbeiðir við grannamálum, tá næmingarnir leggja rødd til sendingina beinleiðis, eins og í “voiceover”, meðan teir vísa hvørjum øðrum stutt brot. Næmingarnir kunnu eisini gera eina heimildarsending í bólki, har ein næmingur hevur høvuðsleiklutin í einum parti um lívið sum barn í Føroyum.

→ mitcfu.dk/TV0000126830

**”Mesterlære – skriv med Bjarne Reuter”**
/ DR1 2020

Her kunnu næmingarnir koma í meistaralæru hjá sjálvum Bjarne Reuter. Í hesari sjónvarpssendingini kemur Bjarne Reuter við góðum hugskotum og preium til skrivingina, og næmingarnir sleppa sjálvandi at royna seg við at skriva skaldskap við íblástri frá meistaranum. Í vegleiðingini er ein uppgáva til næmingarnar, har teir skulu umskriva eina leikmynd úr Zappa, tá Mulle etur ein morsnigil, soleiðis at leikmyndin kemur at snúgva seg um teirra royndir við happing.

→ mitcfu.dk/TV0000120998

**”Pinocchio”**
/ Spælifilmur, Italia 2019

Nýggi filmurin - við sera væl eydnaðari danskari talu – um klassiska ævintýrið líkist ikki nógv Disney klassikaranum frá 1940. Filmurin er eitt klassiskt menningarævintýr við heima-úti-heima bygnaði um trædukkuna, Pinocchio, sum fer heimanífrá fyri ígjøgnum nógvar roynslur at finna seg sjálvan og gerast ein veruligur drongur. Filmurin riggar væl í einari undirvísingargongd í donskum á miðdeild um tekstaslagið fantasy, um bygnaðin í ævintýrum, um persónarnar og aktantfrymilin. Frásjónargerð til kjak um uppaling og menning av samleika riggar eisini væl í hesum sambandi. Námsfrøðilig vegleiðing er tøk.

→ mitcfu.dk/CFUFILM1120156

**”Ternet Ninja 2”**
/ Spælifilmur, Danmark 2021

Ternet Ninja er stuttligur samstundis sum hann er álvarsamur. Filmurin snýr seg um Aske, sum lærir at seta onnur fyrst. Tú kanst biðja næmingarnar um at skriva tær bestu útsøgnirnar úr filminum niður so hvørt á Padlet, meðan tey hyggja at filminum heima. Síðandi kunnu næmingarnir saman gera eina plakat við hesum útsøgnunum úr filminum saman við myndum úr filminum, sum tey annaðhvørt sjálv kunnu taka ella finna av netinum. Til ber eisini at býta leiklutirnar millum næmingarnar, so teimum bert nýtist at halda eyga við ein leiklut. Felags skjalið á Padlet ger, at næmingarnir fáa kensluna av at hyggja at filminum saman. Her kunnu teir eisini dáma endurgevingarnar úr filminum hjá hvørjum øðrum so hvørt.

→ mitcfu.dk/CFUFILM1123808


Flugt

# / Danskt

## Hádeild

**"Medina: Hele min historie"**
/ Kanal 5 2022
Heimildarsending í 8 pørtum. Uppgávur eru til fyrsta part. Her verður endamálið við heimildarsendingini viðgjørt: fyrstu árini hjá Medinu, myndin, sum Medina gevur av sær sjálvari, og hvussu miðlarnir handfara hana. Fyrsti parturin av heimildarsendingini er upplagdur til felags arbeiði í flokkinum. Síðani kunnu næmingarnir fara í 7 bólkar, sum hvør fær ábyrgdina av einum at teimum 7 írestandi pørtunum av røðini. Uppgávan, sum bólkurin skal arbeiða við, kann t.d. vera at velja 2-3 brot, sum tey meta vera av serligum týdningi, og sum tey leggja fram fyri restini av flokkinum.

→ mitcfu.dk/TV0000127912

**"Herlufsholms hemmeligheder"**
/ TV2 2022
Heimildarsendingin Herlufsholms hemmeligheder elvdi til nógv kjak, tá hon var send í danska sjónvarpinum. Heimildarsendingin er tí eitt gott dømi um, hvussu stóra ávirkan hetta slagið av sendingum hevur. Uppgávur eru gjørdar til sendingina til næmingar í 7. – 10. flokki, har teir kunnu arbeiða við bygnaðinum og innihaldinum í sendingini. Serligur dentur er lagdur á kveikjaran, frásagnarháttin, mentanina á skúlanum, keldur eins og á tær broytingar á skúlanum, sum heimildarsendingin hevði við sær.

→ mitcfu.dk/TV0000127769

**"Flugt"**
/ DR2 2022
Donsk heimildarsending sum teknifilmur frá 2021. Sannleikin hevur týdning. Hvat ger tað við okkum menniskju, tá lygnirnar byrja at gerast størri og fleiri og vit gerast bangin fyri at siga sannleikan? Hendan heimildarsendingin snýr seg um at viðurkenna sín seksualitet, ikki at dylja umstøðurnar við flýggjan og at hava dirvi at standa andlit til andlits við tað farna. Upplagt er, at næmingar kanna, hvussu sendingin ger vart við, at hon er bygd á fakta og ikki er íspunnin, sum teknifilmar vanliga eru. Námsfrøðilig vegleiðing er við.

→ mitcfu.dk/TV0000126982

**"Den skyldige"**
/ Spælifilmur, Danmark 2018
Sera spennandi drama á tilbúgvingarstøðini gjøgnum 42 uppringingar. Søgan gongur fyri seg í rúminum hjá vakthavandi – og bert sum ljóð. Hetta er ein sterkur, væl spældur virðisløntur spælifilmur, sum megnar at fáa hugflogið í gongd hjá hyggjarunum, tí tey ímynda sær hendingarnar. Viðmerkingarnar til brotini hava allar samrøðurnar við, og fleiri av hesum kunnu vera nýttar sum íblástur til visuella samskriving, annaðhvørt við at næmingarnir gera eitt søguhandrit ella sjálvir gera filmsupptøkur.

→ mitcfu.dk/CFUFILM1125727

/ Síggj dømi um sjónvarpssendingar og spælifilmar, sum eru viðkomandi fyri undirvísing og sum hava námsfrøðiliga vegleiðing til lærugreinina danskt á mitCFU.fo


Stille hjerte

# / Kristni

## Grunddeild

**”Ängeln”**
/ SVT2 2014

Teknifilmur, sum er einfaldur og lættur at skilja. Ein eingil dettur niður av himli. Veingir hennara bera hana ikki, tí teir minka, hvørja ferð hon ger okkurt býtt ímóti øðrum. Ein dag kemur hon fram við einum sirkusi. Her er tað kanónkongurin, sum roynir at hjálpa henni við at koma at flúgva aftur. Hetta eydnast tó ikki fyrr enn hon byrjar at gera gott ímóti øðrum. Námsfrøðilig vegleiðing fylgir við.

→ mitcfu.dk/TV0000013923

## Miðdeild

**”Venner med døden”**
/ DR Ultra 2018

Barnatíðindafólkini, Mille og Mathias, vilja vita meira um deyðan, og um hvat hendir, tá vit eru deyð. Í hesum partinum vitja tey ein gravarhjálpara og eitt hospice, sum er eitt heim fyri deyðssjúk fólk. Í sendingini er voiceover, tá tað er neyðugt, sum børnini sjálv gera. Av og á verða temu tikin upp, eins og ein teknifilmur við ymiskum sannroyndum um deyðan verður vístur. Mathias og Mille greiða frá, gruna um og kjakast um, hví børn skulu vita meira um deyðan, enn tey flestu vaksnu halda, at tey skulu.

→ mitcfu.dk/TV0000113650

**”Djur jag dödade förra sommaren”**
/ SVT2 2013

Stuttfilmur, sum riggar væl til undirvísing í kristni í miðdeild. Her verða etiskir tilveruspurningar um lív og deyða og rætt og skeivt tiknir upp. Filmurin tekur evnið at drepa – í hesum føri at drepa djór – upp til viðgerðar. Er tað til dømis í lagi at drepa eitt lítið djór men ikki eitt stórt? Er ein stigskipan galdandi í djóraheiminum, sum endurspeglar, hvussu vit fata dráp av hesum djórum, og sum letur upp fyri spurningum um rætt og skeivt og ábyrgd og skuld? Námsfrøðiliga vegleiðingin leggur dent á hesar spurningar í mun til lærugreinina kristni. Stuttfilmurin hevur danskan tekst.

→ mitcfu.dk/TV0000027050

## Hádeild

**”Stille hjerte”**
/ Spælifilmur, Danmark 2021

Ein hjartanemandi filmur um truplu viðurskiftini í sambandi við, tá onkur fer at doyggja. Filmurin kemur eisini inn á hjálp til sjálvmorð, og tekur spurningar upp sum nær, hví og hvør skal gera av, nær lívið skal enda. Vegleiðingin leggur upp til at arbeiða við tvístøðunum í filminum og við heimspekiligum samrøðum við næmingarnar og millum næmingar um etiskar og almenniskjaligar spurningar, sum filmurin vekir í teimum. Aktiv deyðshjálp sæst úr fleiri sjónarhornum.

→ mitcfu.dk/CFUFILM1123921

# / Kristni




**”Jesu fødselsdag”**
/ TV2 2017

Peter Ingemann vitjar heilaga landið, Ísrael, og vestara áarbakkan, sum er herðsettur. Hann gongur í fótasporum Jesu frá føðing til deyða í býunum Nasaret, Betlehem og Jerusalem, og kirkjurnar í býunum – boðanarkirkjuni, føðikirkjuni og gravkirkjuni. Gjøgnum sendingina verður kristindómurin og kristnar siðvenjur lýstar, partvís gjøgnum fólk, sum býr á staðnum, og partvís gjøgnum tey mongu, sum vitja staðið. Viðmerkingarnar fylgja sendingini í tíðarrøð og gevur eitt innlit í, hvussu nútíðin umsitur hesi alheilagu støðini í kristindóminum.

→ mitcfu.dk/TV0000109571

**”5 skarpe om døden”**
/ DR K 2015

Sendingin leggur upp til at arbeiða við deyðanum tvørtur um religión og lívsáskoðan við støði í hesum evnum: Tá menniskjan fekk deyðsangist, norðurlendskur deyði, eysturlendskur deyði, kristin deyði og nýmótans deyði. Arbeitt kann vera við einari felags yvirskipaðari orðing – lýst úr ymiskum sjónarhornum. T.d. hvussu uppliva vit deyðan? Hvussu hongur okkara fatan av deyðanum, okkara trúgv, og samfelagið, vit liva í, saman? Námsfrøðiliga vegleiðingin tekur støði í kristni í 8. - 10. flokki.

→ mitcfu.dk/TV0000033046

**”The Matrix Resurrections”**
/ Spælifilmur, USA 2021

Cyberpunkfilmurin, The Matrix Resurrections, er hin fjórði í røðini um The Matrix. Allir filmarnir snúgva seg um tøkniliga syndafallið, har framleiðslan av hugsandi maskinum hevur elvt til, at menniskju verða fangað í einum tykisheimi – The Matrix – har tey verða nýtt sum orka til skipanina. Tað er eitt gott hugskot at greiða næmingunum frá Matrix-heiminum, áðrenn teir síggja filmin, og geva teimum nøkur temu at hugsa um, áðrenn teir fara í gongd við at viðgera filmin, tí greiningin og tulkingin av filminum er avbjóðandi, tó at hon er áhugaverd og leggur upp til kjak um tilveruspurningar, bæði tá tað kemur til menniskju og eftirgjørt vit.

→ mitcfu.dk/CFUFILM1127954

/ Síggj dømi um sjónvarpssendingar og spælifilmar, sum eru viðkomandi fyri undirvísing og sum hava námsfrøðiliga vegleiðing til lærugreinina kristni á mitCFU.fo

# / Støddfrøði



Livet i Mattelandet

## Grunddeild

**"Historien om uret"**
/ DR1 2011

Ein stuttur filmur, sum lýsir tíðarmátarar gjøgnum søguna og hugleiðir um hugtakið tíð. Filmurin er samansettur av upplýsingum um sannroyndir, av skemti og leggur upp til grunan. Hann riggar væl sum íblástur til undirvísing í fleiri av lærugreinunum í innskúlingini, t.d. donskum og støddfrøði. Námsfrøðilig vegleiðing fylgir við.

→ mitcfu.dk/TV0000017846

**"Skæg med matematik"**
/ Tv-serie, DR Ramasjang 2014

Hr. Skæg roknar og telur saman við teimum smæstu. Uppgávur eru gjørdar til hvørja sending, sum ger tað lætt og einfalt at leita ymiskt fram, uppgávur, kappingar og sangir í undirvísingarhøpi.

→ mitcfu.dk/TV0000031517

## Miðdeild

**"Livet i Mattelandet"**
/ SVT Barnkanalen 2021

Vælkomin í landið, har støddfrøðin er altavgerandi. Hetta er ein svensk sjónvarpsrøð í 12 pørtum um stuttliga støddfrøði. Her kanst tú læra um tølini 0 og 1, javnatekn og sirklar! Kann talið 0 brúkast til nakað? Kom við inn á talverkstaðið og vita, um tú kanst gera ovurstór tøl við nullum. Í roknibakarínum lærir tú, hvussu javnateknið er. Í Geometri bankanum fær ein fitt álvagenta hjálp við at finna ein nýggjan sirkul til gloriu. Orkestrið á støddfrøðimatstovuni syngur um líkningar og ólíkningar.

→ mitcfu.dk/TV0000122806

**"Kalkyl"**
/ SVT1 2017

Svensk sjónvarpsrøð í 6 pørtum um vinklar, ummál, rúmd, støddarlutfall og líkindarokning. Námsfrøðilig vegleiðing og uppgávur hoyra til hvønn part.

→ mitcfu.dk/TV0000105091

**"NØRD – ultra:bit"**
/ DR Ultra 2018

Hvønn leiklut spælir tøknin í gerandisdegnum? Um lívið hjá tær var ein app, hvussu hevði hon so sæð út? Sendingin er býtt upp í brot, sum kunnu brúkast at tosa um, hvussu vit nýta snildfonir og appir í gerandisdegnum. Viðmerkingar eru til einstøku brotini umframt spurningar, sum næmingarnir kunnu arbeiða við aftaná hvørt brot.

→ mitcfu.dk/TV0000113485

# / Støddfrøði




Hádeild

**”Supercodes – naturens hemmelige formler”**
/ ZDF 2021

Týsk heimildarsending í tveimum pørtum. Sendingin er um Harald Lesch, professara, fysikara og náttúruheimspeking, sum kannar ósjónligu lógirnar og frymlarnar, sum binda alt saman. Hvat hava kengurur og brýr í felag? Hví er tónleikur í veruleikanum støddfrøði, og hvat hava veðurvánirnar at gera við pengaspæl? Øll skap, mynstur og bygnaðir fylgja algildum kotum, sum eru fjaldar í náttúruni. Kom við, tá vit elta hesar superkotur, sum gera heimin til tað, hann er. Viðmerkingar og uppgávur fylgja við.

→ mitcfu.dk/TV0000124304

**”Matematikkens mægtige mysterier”**
/ DR2 2019

Hvat er støddfrøði og hvaðani kemur hon? Mario Livio, stjørnualisfrøðingur, eltir støddfrøðislóðina frá Pythagoras til Einstein og tekur fram ófatiligu ávirkanina, sum støddfrøðin hevur á alt – heilt frá fyrstu tráðleysu úrvarpssendingarnar til snyrilsskapið á sniglahúsinum. Viðmerkingar til brotini og arbeiðsuppgávur fylgja við.

→ mitcfu.dk/TV0000115852

**”Fryden ved data – big data!”**
/ DR3 2018

Dátur í yvirmát er tað, sum øll vilja hava. Nógv eru eisini stúrin. Bretski støddfrøðingurin, Hannah Fry, heldur harafturímóti, at dátur føra okkum fram á veg til betri upplýsing, innlit og vísdóm. Hannah Fry greiðir frá, hvat big data – dátur í yvirmát – kunnu nýtast til, og um slóðbrótararnar handan big data, t.d. Claude Shannon, støddfrøðing, sum ikki nógv hava hoyrt um, men sum flutti okkum inn í upplýsingarøldina.

→ mitcfu.dk/TV0000110404

**”X+Y”**
/ Spælifilmur UK 2014

Enski tannáringurin, Natan, er bæði innanhokin og eitt flogvit innan støddfrøði. Hann verður úttikin til enska landsliðið í støddfrøði, sum skal kappast á Olympisku leikunum í støddfrøði. Nathan finnur tó út av, at lívið er annað enn støddfrøði. Námsfrøðilig vegleiðing til lærugreinarnar danskt og enskt.

→ mitcfu.dk/CFUFILM1073957

**” Vinstchanser”**
/ SVT1 2013

Sendirøðin Siffror er við støddfrøðinginum, Jo Røislien, sum tekur hyggjaran við á eina áhugaverda ferð inn í talheimin. Hann sær støddfrøði allastaðni og heldur, at støddfrøði kann hjálpa okkum at fata heimin! Hvussu ber tað til? Í hesum partinum ætlar Jo Røislien at vinna á spælikasinonum í Las Vegas. Hann tosar við ein privatdetektiv, sum avdúkaði heimsins besta kortteljara. Hvørji eru sannlíkindini fyri, at tað ósannlíka hendir?

→ mitcfu.dk/TV0000026027

/ Síggj dømi um sjónvarpssendingar og spælifilmar, sum eru viðkomandi fyri undirvísing og sum hava námsfrøðiliga vegleiðing til lærugreinina støddfrøði og miðdeild á mitCFU.fo


The Zoo

# / Enskt

## Grunddeild

**”Eggs”**
/ BBC Prime 2008

Sendingin er um litríku ‘auntie Mabel’ og hundin Pippin, sum saman finna tey ymisku temuni á teirra gongu- ella flogtúrum. Hendan sendingin snýr seg um egg. Frásagnarpersónurin og ‘auntie Mabel’ tosa sera skilligt. Ávís orð og orðingar verða endurtikin fyri at orðafeingið hjá hyggjarunum verður víðkað. Til hvørja sending er annaðhvørt ein teknifilmur ella sannroynd, sum stuðlar temanum. Námsfrøðiliga vegleiðingin kemur við uppskotum til arbeiði við munnligum og skrivligum samskifti, við mentan og samfelagi.

→ mitcfu.dk/TV0000012314

**”Monsters Inc.”**
/ Spælifilmur, USA 2001

Søgan fer fram í býnum Monstropolis, hvørs orkukelda eru skríggj frá børnum, sum verða savnað saman. Hvørja nátt fara skrímslini til arbeiðis í parallellu verðini hjá menniskjum fyri at ræða børnini og taka skríggini heim við aftur. Ein frálíkur filmur, sum tykist at snúgva seg um skrímsl og ódjór, men sum í veruleikanum snýr seg um vinalag. Eitt gott hugskot er at byrja við at vísa fyrstu 4 minuttirnar í filminum, tá umhvørvið verður lýst og søgan verður løgt fram. Filmurin kann síggjast við ella uttan danskan ella enskan tekst.

→ mitcfu.dk/CFUFILM1115211

## Miðdeild

**”The Zoo”**
/ Boomerang 2020

Teknifilmurin er í trimum pørtum og snýr seg um verulig djór í einum djóragarði. Her er nógv skemt og djórini tosa við ymiskum málføri, so næmingarnir mugu veruliga lurta væl eftir fyri at skilja. Ivaleyst eru orð, sum næmingarnir ikki skilja, men teir skulu royna at fanga orð og setningar soleiðis, at teir fáa eina heildarfatan av filminum. Tað riggar væl at nýta filmin til ein lítlan steðg, eins og tað eisini ber til at arbeiða við temum og orðafeingi í filminum. Vegleiðing fylgir við.

→ mitcfu.dk/TV0000119660

**”The Lego Movie”**
/ Spælifilmur, USA 2014

Ein serstøk og framúrskarandi søga, sum á einari fláð snýr seg um stríðið millum tað góða og tað ónda, men sum í veruleikanum snýr seg um at hava álit á sær sjálvum og sínum evnum. Avmarkingarnar í teknifilminum verða vigaðar upp ímóti við teirri góðu søguni og framúrskarandi røddunum, sum leiklutirnir hava. Røddirnar hava nakrar av kendastu sjónleikarunum í Hollywood lagt afturat, sum t.d. Morgan Freeman, Will Ferrell, Liam Neeson, Jonah Hill. Uppgávurnar fara inn í tvídráttin í filminum og spurningar til næmingarnar sum uppskot til kjak og framløgu.

→ mitcfu.dk/CFUFILM1124356



Rose McGowan:
Kvinden, der startede
#MeToo

# / Enskt

Hádeild

**”Travellers: A Culture in Crisis”**
/ BBC World 2022

Ein sending um kúgan og fordómar, sum írskir flakkarar – sigoynarar – uppliva í Írlandi. Sendingin kemur eisini inn á tær øðiligu avleiðingarnar, sum standast av teirri kreppu, sum mentan teirra er í. Sendingin riggar væl til at arbeiða við evnum sum missmuni og rættindum. Næmingarnir eiga at festa seg við fleiri viðkomandi hugtøk, sum teir síðani kunnu nýta aftur í sínum egna skrivliga ella munnliga arbeiði. Av tí at næmingar ikki eru so vanir við at hoyra írskt, hava teir kanska tørv á hjálp við at skilja sendingina, tí sendingin ikki er tekstað. Í vegleiðingini til sendingina er dentur lagdur á orðafeingið í sambandi við evni at nýta til samrøður.

→ mitcfu.dk/TV0000128134

**”Rose McGowan: Kvinden, der startede #MeToo”**
/ DR2 2022

Amerikonsk heimildarsending í 4 pørtum. Sendingin er viðkomandi fyri at skilja, hvussu #MeToo rørslan byrjaði, og fyri at hoyra eina av røddunum í stríðnum fyri kvinnurættindum. Hvør partur hevur eina yvirskrift – og teir flestur hava eisini eina undiryvirskrift. Lyklaorð eru til hvørt brot. Lærarin má meta um, hvørjir eru viðkomandi fyri næmingarnar.

→ mitcfu.dk/TV0000127863

**”Den amerikanske drøm om en sportsstjerne”**
/ DR2 2022

Sendingin er um fýra ungar mans og ein venjara og dreym teirra um at sleppa ígjøgnum nálareygað til NFL og NBA. Temuni eru: The American Dream, vón, útbúgving, ítróttur, vald og amerikanska stættasamfelagið. Næmingarnir kunnu hyggja at sendingini í felag í skúlanum, men hon kann eisini nýtast í sambandi við evnið, sum næmingarnir hava valt. Næmingarnir kunnu velja at hugsavna seg um ein av teimum 5 persónunum, meðan teir hyggja at sendingini, fyri síðani at fara í dýpdina við støðuni hjá hesum persóninum. Viðmerkingar og uppgávur fylgja við.

→ mitcfu.dk/TV0000127097

**”10 Things I Hate About You”**
/ Spælifilmur, USA 1999

Fyrsta skúladag verður Cameron forelskaður í vøkru Biancu. Men Cameron sleppur ikki at bjóða Biancu út á deyt fyrr enn onkur eisini bjóðar sera illsintu systur Biancu út. Hendan tvístøðan – hóast sera amerikonsk – kann vera støðið undir arbeiðinum við filminum, av tí at familjuviðurskifti og skúli sjálvandi eru uppløgd at bera saman við hvussu tey eru aðrastaðni í heiminum. Filmurin minnir um leikin hjá Shakespeare, Taming of the Shrew. Í vegleiðingini eru tilvísingar til Shakespeare og hugskot til, hvussu hann kann takast við í undirvísingina.

→ mitcfu.dk/CFUFILM1127963

/ Síggj dømi um sjónvarpssendingar og spælifilmar, sum eru viðkomandi fyri undirvísing og sum hava námsfrøðiliga vegleiðing til lærugreinina enskt á mitCFU.fo

# / Týskt



Fritzi og revolutionen

## Miðdeild

**”Da Hitler stjal den lyserøde kanin”**
/ Spælifilmur, Týskland 2019

Filmurin, sum er bygdur á bestseljara sjálvsævisøguna hjá Judith Kerr, er um eina gentu og familju hennara, sum má fara í útlegd stutt fyri, at Evropa loðar undir seinna veraldarbardaga. Námsfrøðiliga vegleiðingin vendir sær til læraran, men hevur uppgávur til næmingar í bæði donskum og týskum. Høvuðstemað er flóttafólk – við støði í jødisku flóttafólkunum undir seinna veraldarbardaga. Frásøgnin hóskar til málbólkin, og hvørki harðskapur ella ræðuleikar verða lýstir í filminum, sum tí eisini hevur 7 ára aldursmark. Onnur temu, sum eru til viðgerðar, eru siðvenjur, reglur og óskrivaðar reglur og vanar í familjum, føðingardagar, jól og tað at ferðast.

→ mitcfu.dk/CFUFILM1120157

**”Pilotin”**
/ ARD 2021

Týsk vísindasending til børn. Angie er 11 ára gomul. Hon vil vera flogskipari, men hevur ongantíð verið á flog. Í hesum partinum vitjar hon ein veruligan flogskipara, sum hon fylgir ein heilan arbeiðsdag – hon fer harafturat á flog við honum til Lissabon. So fáa vit at síggja, um hon framvegis vil vera flogskipari, tá dagurin er av. Sendingin kann brúkast í sambandi við, at næmingar skulu læra ymisk orð og hugtøk í sambandi við ymisk størv – t.d. tá næmingar presentera familju sína. Í hádeild kunnu næmingarnir arbeiða við og fáa íblástur til at greiða frá sínum dreymastarvi – ‘Traumjob’. Í uppgávunum eru spurningar og málsligar orðingar, sum eru í sendingini, sum næmingarnir kunnu víðka sítt orðafeingi við.

→ mitcfu.dk/TV0000125493

**”Fritzi og revolutionen”**
/ Spælifilmur, Týskland 2019

Teknifilmur, sum við barnaeygum lýsir støðuna í Eysturtýsklandi fram til, tá Berlinmúrurin fall. Teknifilmurin og 12 ára gamla gentan, sum er høvuðspersónur, gera at hesar truplu hendingarnar, sum á heysti 1989 høvdu við sær, at Berlinmúrurin fall og Týskland sameintist – Die Wende – verða lýstar á ein sera lættan og greiðan hátt. Í námsfrøðiligu vegleiðingini eru uppgávur til næmingar í týskum við serligum denti á Die Wende og hvat liggur aftanfyri bókstavirnar BRD, DDR og Stasi.

→ mitcfu.dk/CFUFILM1117877

## Hádeild

**”Sind wir Freunde?”**
/ ZDF 2022

Týsk vísindasending fyri børn og ung, sum tekur temu úr gerandisdegnum upp til viðgerðar. Partur av sendingini, har uppgávur hoyra til, kann nýtast í sambandi við temað ‘Freundschaft’. Parturin kann viðgerast í byrjanini av einari gongd ella seinni, tá aðrir tekstir kunnu takast við í viðgerðina. Næmingarnir kunnu gera yvirlýsingar um mest umráðandi viðurskifti í sambandi við ‘Freundschaft’, sum koma fram í sendingini ella sum næmingarnir sjálvir koma við. Uppgávur fylgja við.

→ mitcfu.dk/TV0000127857



Sind wir Freunde?



Pilotin

# / Týskt

**”Fremd im eigenen Körper”**
/ ARTE 2022

Talið á skurðviðgerðum í sambandi við kynsskifti er seinastu árini hækkað sera nógv í Evropa – eisini í Týsklandi. Sendingin lýsir fleiri ymiskar áskoðanir og søgur í sambandi við kyn og kynsskifti. Sendingin riggar væl sum íblástur til samrøður og kjak um nøkur av viðurskiftunum, sum gera seg galdandi í sambandi við kynsskifti og til at bera saman við Danmark ella onnur lond, har týskt verður tosað. Uppgávurnar til sendingina taka støði í søgunum hjá teimum, ið eru við í sendingini, og spurningar eru til næmingarnar at arbeiða við.

→ mitcfu.dk/TV0000127578

**”Tigermælk”**
/ Spælifilmur, Týskland 2017

Summar í Berlin. Nini og Jameelah eru báðar 14 ára gamlar, bestu vinkonur og teimum dámar væl at royna mørk. Tær hava lítlar og ongar stúranir, og lívið er ein veitsla. Genturnar vilja royna alt, sum lívið hevur at bjóða; tær drekka, roykja, stjæla og royna sín seksualitet. Hetta er ein viðkomandi menningarfilmur – coming-of-age filmur – sum viðger førleikamálini mentan og samfelag í sambandi við evnini: Familie, Freundschaft og Erwachsen werden. Fleiri møguleikar eru fyri munnligum og skrivligum avrikum, sum eru grundað á persónarnar í sendingini, teirra mentanarbakgrund, sambond og menning.

→ mitcfu.dk/CFUFILM1106020

/ Síggj dømi um sjónvarpssendingar og spælifilmar, sum eru viðkomandi fyri undirvísing og sum hava námsfrøðiliga vegleiðing til lærugreinina týskt á mitCFU.fo

# / Søga og samfelagsfrøði



Thatcher og Reagan - et særligt venskab

## Miðdeild

**”Den usynlige pige”**
/ Spælifilmur, Írland/Kanada 2017

Dentur er lagdur á siðbundnu kvinnuáskoðanina í Kabul, har Taliban fremur yvirgang ímóti fólkinum, og serstakliga ímóti kvinnum. Serligur partur av temanum í filminum og í søgugongdini er at fortelja søgur. Ein søga fortald við songarstokkin verður flættað saman við søguna um eina gentu, sum klippur hárið og fer at lata seg í dreingjaklæðir, hetta fyri yvirhøvur at sleppa at ganga úti. Hon er tann einasta í húskinum, sum kann vinna pengar á marknaðinum til húsarhaldið, av tí at pápi hennara av órøttum er settur í fongsul. Nógv undirvísingartilfar fylgir við til bæði danskt, søgu og myndlist.

→ mitcfu.dk/CFUFILM1113110

**”Kærlig hilsen”**
/ TV2 2018

Hetta er ein heimildarsending í 4 pørtum, sum hvør hevur ein kendan danskara sum høvuðspersón. Við familjuni hjá Jarl Friis Mikkelsen fara vit aftur til 1963, við Marianne Flormann fara vit til 1976, Anne Sofie Espersen til 1985 og Felix Schmidt til 1988. Hesi fýra kendu fólkini fara við allari familjuni aftur í hendan tíðarlumman og skulu í tríggjar dagar royna at liva sum tey gjørdu tá. Námsfrøðiliga vegleiðingin er gjørd soleiðis, at hon fevnir um allar 4 sendingarnar við nøkrum yvirskipaðum hugskotum.

→ mitcfu.dk/TV0000115032

## Hádeild

**”Thatcher og Reagan - et særligt venskab”**
/ DR2 2022

Fyrsti partur av heimildarrøðini um vinalagið millum Thatcher og Reagan og 1980ini. Her fáa vit innlit í, hvussu og hví “the Iron Lady” og sjónleikarin gjørdust so góðir – politiskir – vinir, og ikki minst, hvønn týdning teirra vinalag fekk í spentum støðum. Serliga trý temu verða viðgjørd í hesum sambandi; fíggjarkríggið ímóti Sovjetsamveldinum, Falklandskríggið og uppsetingin av krússararakettum í Evropa. Eitt yvirlit yvir innihaldið er gjørt til báðar heimildarsendingarnar.

→ mitcfu.dk/TV0000129083

**”Maren Splids - de satans kvinder”**
/ DR2 2009

Maren Splids er kendasta heksin í Danmark. Hon varð fødd úti á landinum millum tey fátøku. Harða tilveran hjá festibóndum verður væl lýst í sendingini. Maren Splids var ein røsk kvinna og var ivaleyst eisini ein, sum tey róptu ‘en købekone’ – ein sum keypti og seldi vørur, lænti øðrum pengar ímóti veðhaldi. Harafturat hevði hon eitt vertshús. Millum fólk í Ribe var hon, saman við manni sínum, kend og vird kona. Ein tilvildarlig hending broytti tó hetta – ja, broytti alt lívið. Námsfrøðilig vegleiðing fylgir við.

→ mitcfu.dk/TV0000125731

/ Síggj dømi um sjónvarpssendingar og spælifilmar, sum eru viðkomandi fyri undirvísing og sum hava námsfrøðiliga vegleiðing til lærugreinarnar søgu og samfelagsfrøði á mitCFU.fo

# / Søga og samfelagsfrøði

## Hádeild

**”Fodboldens grådige bagmænd”**
/ DR1 2022

Heimildarsendingin er um European Super League, sum ætlandi skuldi vera ein kapping fyri størstu fótbóltsfeløgini í Evropa, men sum óvæntað fekk sera harða mótstøðu frá at kalla øllum pørtum innan fótbóltsheimin – øllum uttan eigarunum. Sendingin lýsir eitt grefligt dømi um ávirkanina, sum pengar hava á úrvalsítróttin í dag, og tí kann hon nýtast sum dømi í einari undirvísingargongd sum viðger úrvalsítrótt og pengar í lærugreinunum ítróttur, samfelagsfrøði ella líknandi lærugreinum.

→ mitcfu.dk/TV0000128273

**”Korpset - gjort af det rette stof (3)”**
/ TV2 2022

Donsk veruleikasending um samstarv og leiðslu. Námsfrøðiliga vegleiðingin hevur fleiri uppskot til, hvussu næmingar kunnu arbeiða við veruleikasjónvarpi í hádeild í donskum. Ein pakki við 7 veruleikasendingum, sum saman fevna um tey sjey undirsløgini av veruleikasjónvarpi, og sum tí verður viðgjørd frá fleiri sjónarhornum. Uppgávur til næmingar fylgja við.

→ mitcfu.dk/TV0000129209

**”Margrete den Første”**
/ Spælifilmur, Danmark 2021

Ein søguligur filmur um valdstríð, valdsmisnýtslu og at vera kvinnuligur leiðari í 1400talinum – við tilsipingum til líknandi stríð á okkara døgum. Námsfrøðiliga vegleiðingin við uppgávum til næmingar til danskt og søgu hevur uppskot til kjak um stóru søguligu trupulleikarnar; hvussu vit handfara ósemjur, vald, at skapa samgongur, hvussu vit fáa arbeiðslív og familjulív at hanga saman, rættvísi og revsing.

→ mitcfu.dk/CFUFILM1126788

# / Náttúruvísindi

## Grunddeild

**”Mægtige maskiner – lastbil”**
/ DR1 2010

Hetta er ein sjónvarpssendirøð í 13 stuttum pørtum. Allar sendingarnar hava sama bygnað – ein sang í inngangingum, eitt stuttan film um maskinuna, eina spurnakapping og eitt rútmurapp við mynd og teksti. Næmingarnir læra á einfaldan og námsfrøðiligan hátt um, hvussu ymiskar maskinur arbeiða. Filmarnir rigga væl til arbeiði við fakteksti. Námsfrøðiliga vegleiðingin hevur fleiri uppskot til, hvussu hendan arbeiðsgongdin kann leggjast til rættis og setast saman til næmingarnar. Uppgávurnar, sum hoyra til, stuðla arbeiðinum í flokkinum við hesum ymisku maskinunum á ein hátt, so at næmingarnir kunnu arbeiða saman tveir og tveir ella í størri bólkum.

→ mitcfu.dk/TV0000016728

## Miðdeild

**”NØRD - ultra:bit”**
/ DR Ultra 2018

Tøknin fyllir alsamt meira í gerandisdegnum. Sendingin kannar, hvørja ávirkan, tøknin hevur á okkara lív. Hon er deild upp í fleiri brot, sum hvørt kann nýtast sum íblástur til eitt prát um, hvussu vit nýta snildfonir og appir í gerandisdegnum. Uppgávurnar til sendingina vísa einstøku brotini og hava spurningar, sum næmingarnir kunnu arbeiða við aftaná hvørt brot.

→ mitcfu.dk/TV0000113320


En alfahun i Yellowstone

**”En alfahun i Yellowstone”**
/ DR1 2018

Úlvar veiða fyri at liva – vanliga í flokki við einum ráðandi kallúlvi á odda. Í friðaða náttúruøkinum Yellowstone í Amerika er ein villur úlvaflokkur við einari serliga úlvatík á odda. Heimildarsendingin um úlvaflokkin í Yellowstone nýtir somu frásagnarkynstur sum spælifilmar nýta at fanga áhugan hjá hyggjaranum. Næmingar læra gjøgnum sendingina, hvussu úlvar liva í tí villa. Námsfrøðiliga vegleiðingin er upplegg til tvørfakligt samstarv millum lærugreinarnar danskt og náttúru/tøkni við serligum denti á, hvørji frásagnarkynstur eru nýtt í djórafilminum fyri at fanga hyggjaran, umframt hvussu filmurin kann nýtast til at víðka um orðfeingið í sambandi við, tá næmingar sjálvir skulu skriva tekst um úlvar.

→ mitcfu.dk/TV0000110910

## Hádeild

**”Gravity”**
/ Spælifilmur, USA, 2013

Royndi rúmdarfararin Matt Kowalski er á síðstu rúmdarferð sínari saman við Ryan Stone, sum er á sínari fyrstu rúmdarferð. Meðan tey arbeiða á rúmdarstøðini hendir tað, ið ikki má henda; ein gamal russiskur fylgisveinur rennur á rúmdarstøðina og sendir Matt Kowalski út í endaleysu rúmdina á eina drúgva ferð inn í ta óendaliga. Filmurin kann nýtast sum innleiðsla til undirvísingargongd um rúmdarferðir. Áðrenn næmingarnir fara at hyggja at filminum, kunnu teir verða bidnir um at skriva, hvar teir síggja náttúruvísindi í gerandisdegnum. Námsfrøðilig vegleiðing til alis- og evnafrøði fylgir við.

→ mitcfu.dk/CFUFILM1120954

**”Fit i en fart - fup eller fakta?”**
/ TV2 2020

Ensk heimildarsending. Tað sigst, at tær tørvar bert 2 minuttir av harðari venjing um vikuna fyri at vera væl fyri! Hetta sigur í øllum førum heilsujournalisturin, Michael Mosley. Hann tosar við granskarar um seinastu kanningarnar, sum venda øllum, sum vit halda okkum vita um rørslu, á høvdið.

→ mitcfu.dk/TV0000119190

**”Ebba Lund”**
/ DR K 2016

Til sjónvarpssendingina – serliga til undirvísing í lívfrøði og alis- og evnafrøði, eru uppgávur gjørdar, sum fylgja lívi og virki hjá evnaverkfrøðinginum, Ebbu Lund. Serligur dentur er lagdur á stríðið hjá Ebbu Lund fyri at gerast viðurkendur granskari og á hennara slóðbrótandi avdúkingar í virusgranskingini. Í viðmerkingunum eru fleiri hugskot til uppgávur í lærugreinunum lívfrøði og alis- og evnafrøði at arbeiða við. Her eru haruframt hugskot til bæði munnligar og skrivligar uppgávur.

→ mitcfu.dk/TV0000104153

/ Síggj dømi um sjónvarpssendingar og spælifilmar, sum eru viðkomandi fyri undirvísing og sum hava námsfrøðiliga vegleiðing til náttúruvísindaligar lærugreinar á mitCFU.fo

# / Myndlist



Maleri – Kreakampen

## Grunddeild

**"Ernest & Celestine (1)"**
/ DR Ramasjang 2018

Upplagt er at arbeiða við ávísum senum í sendingini í myndlist við denti á samrøðu um m.a. stíl og teknikk, sum síðani kann vera støðið undir, tá næmingarnir sjálvir fara at arbeiða við tekning og vatnlitsmáling. Við støði í uppgávunum við næmingaspurningum verður tosað saman so hvørt. Aftaná, at næmingarnir hava sæð filmin, kunnu teir velja eina til tvær senur av serligum týdningi, sum fyrst skulu teknast við blýanti á vatnlitspappír og síðani verða málaðar við vatnlitsmáling.

→ mitcfu.dk/TV0000113523

**"Fantomdrengen"**
/ Spælifilmur, Frankaríki 2015

11 ára gamli Leo er innlagdur á sjúkrahúsinum við álvarsamari sjúku. Hann leggur til merkis, at hann kann fara úr sínum egna kroppi og sveima út í býin. Hesin kroppur hansara gerst eyguni hjá løgreglukommisserinum, sum situr í koyristóli, og saman steðga teir ætlanunum hjá einum herviligum brotsmanni. Námsfrøðiliga vegleiðingin er ætlað til myndlist, danskt og kristni.

→ mitcfu.dk/CFUFILM1073837

## Miðdeild

**"Maleri - Kreakampen"**
/ DR Ultra 2017

Í námsfrøðiligu vegleiðingini fært tú hugskot til arbeiðið við máling í undirvísingini úr ymiskum sjónarhornum. Fleiri hugskot við støði í sendingini eru til læraran, sum hann kann velja ímillum, t.d. eftirlagingarnar hjá Asger Jorn ella arbeiðið við konstrastum í málningum.

→ mitcfu.dk/TV0000105108

**"Skraldekunst"**
/ KreaKampen, DR Ultra, 2017

Hendan sendingin snýr seg um at gera list úr endurnýtslutilfari. Dómarin er Shane Brox, sum vit kenna úr "Shanes Verden". Námsfrøðiliga vegleiðingin hevur hugskot til, hvussu sendingin kann nýtast sum inngangur til at arbeiða við list úr burturkasti í myndlist. Sendingin riggar eisini avgjørt væl til smíð og design.

→ mitcfu.dk/TV0000105106

**"På toppen af verden"**
/ Spælifilmur, Frankaríki 2017

Vakur teknifilmur um eina sera viljasterka gentu, sum hættar sær í holt við eina ferð og letur hvørki vind ella veður og heldur ikki fordómar forða sær. Vit eru í 1882 og unga gentan, Sacha, hoyrir til russisku aðalsættina í Sankta Pætursborg. Tað verður væntað av henni, at hon ber seg fram, sum tað hóskar seg til eina háborna unga damu. Men Sacha hevur aðrar ætlanir og dreymar og rýmir avstað fyri at leita eftir abba sínum, sum er ein kendur polargranskari, sum hvarv undir einari rannsóknarferð. Námsfrøðilig vegleiðing til myndlist og danskt fylgir við.

→ mitcfu.dk/CFUFILM1076385




## Hádeild

**”Da romantikken rystede vores verden”**
/ DR2 2022

Hendan BBC sendirøðin í trimum pørtum kannar, hvussu romantikkurin sæst aftur í myndlistini, ritlistini og tónlistini í Evropa. Røðin leggur dent á bæði listafólkið og verkið og samtíðina. Tað er upplagt at arbeiða við myndasamanseting í myndlist. T.d. verða myndirnar “Friheden fører folket på barrikaderne” og “Medusas flåde” nýttar sum íblástur til onnur myndlistafólk, eins og fleiri listafólk eisini hava nýtulkað myndirnar. Viðmerkingarnar geva eitt yvirlit.

→ mitcfu.dk/TV0000126560

**”Danmark under forvandling – Fie Johansen”**
/ DR2 2019

14 av bestu fotografunum í Danmark hava í eitt ár tikið alskyns myndir av Danmark fyri at geva nakrar løtumyndir av tí, sum tað sær út beint nú, umframt fyri at senda eina myndaheilsan til framtíðina.

→ mitcfu.dk/TV0000016376

**”Munch i Helvede”**
/ DR2 2019

Heimskendi listamálarin Edvard Munch hevði eitt hjartamál: at kveikja ljós í myrkri – bæði fyri seg sjálvan og mannaættina. Námsfrøðiliga vegleiðingin leggur dent á Edvard Munch og aðrar ekspressjonistiskar listamálarar. Næmingar nema sær kunnleika um, hvussu kenslur og hugsanir kunnu lýsast gjøgnum list, eins og teir eisini sleppa at royna seg við at gera eina mynd, sum hevur hetta í sær.

→ mitcfu.dk/TV0000123094

/ Síggj dømi um sjónvarpssendingar og spælifilmar, sum eru viðkomandi fyri undirvísing og sum hava námsfrøðiliga vegleiðing til lærugreinina myndlist á mitCFU.fo

# / Ungdóms-mentan


Fanny och Lova

Hádeild

**”Fanny och Lova snor en bil”**
/ SVT1 2022

Tá tannáringarnir Fanny og Lova eru á veg heim úr einari veitslu, fáa tær møguleikan at broyta lívið hjá sær. Ein bilur, sum stendur ólæstur, gerst teirra vegur út úr hesum keðiliga lívinum við pillbýttum dreingjum, men kunnu tær veruliga bara flýggja frá øllum? Ein sera góður stuttfilmur, sum riggar væl til undirvísing í grannamálunum. Filmurin hevur bæði svenskan og danskan tekst. Harafturat riggar hann væl til undirvísing í stuttfilmi sum tekstaslag, tí hann er eitt væl eydnað dømi um stuttfilm. Filmurin kann somuleiðis vera partur av undirvísingargongd um ymisk temu á hádeild, sum t.d. samleiki, ungdómur, dreymar og vinalag.

→ mitcfu.dk/TV0000126950

**”Our Ladies”**
/ Spælifilmur, UK 2019

Nakrar gentur úr einum katólskum skúla í Skotlandi fáa í 1990unum møguleika at fara til Edinburgh at kappast í einari kórkapping, men tær tíma nógv betur at ballast enn at kappast. Ein námsfrøðilig vegleiðing og uppgávur fylgja við filminum. Uppgávurnar koma inn á temuni kærleiki og seksualitetur, og hava spurningar, sum kunnu nýtast í sambandi við munnliga arbeiðið hjá næmingunum við filminum. Vegleiðingin leggur dent á bæði munnligar og skrivligar førleikar eins og á bæði mentan og samfelag.

→ mitcfu.dk/CFUFILM1123997

**”Alt for kliken”**
/ DR3 2019

Donsk heimildarsending í 6 pørtum, sum lýsir, hvussu tað er at vera ungur og ganga á studentaskúla í 2019.

Til fyrsta partin eru viðmerkingar og námsfrøðilig vegleiðing við heitinum “Dokumentargenren i dansk”. Vegleiðingin leggur dent á tríggjar danskar heimildarsendingar, sum hvør einstøk lýsir eitt undirliggjandi slag av heimildarsending og sostatt lýsa tekstaslagið væl.

→ mitcfu.dk/TV0000115410

**”Psychobitch”**
/ Spælifilmur, Noreg 2019

Frida er øðrvísi. Marius er hinvegin tann fullkomnasti drongurin í flokkinum. Tá tey bæði skulu arbeiða saman í skúlanum byrjar eitt sera órógvandi og avbjóðandi samband teirra millum. Kravið um at klára seg væl møtir vónleysum kærleika. Námsfrøðilig vegleiðing við denti á ungdómsfilm, samleika og krøvini, tey ungu hava á sær, fylgir við.

→ mitcfu.dk/CFUFILM1113023

**”Marinus kan ikke vælge uddannelse”**
/ DR2 2020

21 ára gamli Marinus veit ikki, hvat hann ætlar sær í lívinum. Tí leitar hann sær andaliga ráðgeving hjá Det gode råd, sum eru Paula Larrain, verturin, og Lars Gustav Lindhart, sóknarprestur, og Pia Søltoft, sum er prestur og serfrøðingur í Kierkegaard, Waseem Hussain, sum er imamur, og Steen Landsy, sum er spirituellur lærari. Ráðini, tey geva, kunnu vera góð ráð fyri nógv onnur ung, sum ivast. Tey fáa okkum eisini at hugsa um krøvini og væntanirnar, sum samfelagið og onnur hava til ungdómin í dag. Sendingin riggar væl til lærugreinina danskt í temum sum ungdómur, samleiki, val í lívinum, væntanirnar hjá øðrum og meiningin við lívinum. Uppgávur fylgja við.Kapitelsæt med elevopgaver.

→ mitcfu.dk/TV0000120705

/ Síggj dømi um sjónvarpssendingar og spælifilmar, sum eru viðkomandi fyri undirvísing og sum hava námsfrøðiliga vegleiðing til ungdómsmentan á mitCFU.fo

## Orðafrágreiðingar til gullið, sum tú finnur í mitCFU

/ Ein námsfrøðilig vegleiðing er undirvísingartilfar, sum lærugreinaráðgevi við frálærugreinafrøði í huga hevur gjørt til lærutilfar og sum er ætlað at geva undirvísarum hugskot til, hvussu lærutilfarið kann nýtast í undirvísingini og, hvussu hetta kann knýtast til annað lærutilfar/setast í frásjón.

/ Ein viðmerking er ein stutt lýsing av, hvussu lærutilfarið kann nýtast í undirvísingini saman við evnisorðum og lærugreinum.

/ Ein viðmerking til brot er ein viðgerð av spælifilmi ella sjónvarpssending, sum lærugreinaráðgevi hevur gjørt, og sum eisini kann hava uppgávur til næmingar.

/ NOTA er ein funka til at fáa tekstin lisnan upp.



Myndatakari | Ditte Valente

Tusnelda | 7. fl.

”

*Mær dámar væl, tá vit hyggja eftir filmi í skúlanum, tí tað er nógv stuttligari og áhugaverdari enn bara at sita og lesa í einari bók. Tað er eisini gott, tí mann onkuntíð skilir betur tað, sum mann hyggur eftir. T.d. tá vit hugdu eftir ’Me, Earl and the dying Girl’, sum snýr seg um at vera tannáringur og onkuntíð at hava tað nokkso ringt.*

**Tusnelda** | 7. fl.

Copydan/
AVU-medier

cfu centre for undervisningsmidler

NÁM

# Fleiri temu og lærugreinar eru á mitcfu.fo

Mitcfu.fo hevur eisini eina ørgrynnu av sjónvarpssendingum og spælifilmum við námsfrøðiligari vegleiðing. So at siga allar lærugreinar eru umboðaðar. Bæði tú og næmingar tínir kunnu stroyma tilfarið.

mitCFU.fo

# Ein heimur við livandi læring

Copydan AVU-medier er atgongd tín til ein heim við livandi læring. Vit eru ein almannagagnligur felagsskapur, sum virkar uttan vinning fyri eyga. Eigararnir av felagsskapinum eru 20 rættindafelagsskapir frá mentanarvinnuni í Danmark. Skúlar og útbúgvingarstovnar í danska kongaríkinum sleppa gjøgnum Copydan AVU-medier framat einari ørgrynnu av sjónvarpssendingum og spælifilmum, sum kunnu nýtast í undirvísingini og í undirvísingargongdum.

copydan-avumedier.dk